## Tann praktfulli Thorbjørn Egner



Hann var føddur í Oslo í Noreg 12.12.12 kl 12. - Tað síðsta pástóðu foreldur míni, so tað man passa, skrivar Thorbjørn Egner í endurminningum. Egner var ein fjølbroyttur listarmaður. Hann var teknari, grafikari, scenografur, dramatikari, komponistur og rithøvundur. Hann teknaði sum oftast sínar egnu bøkur, og mest og best man hann vera kendur fyri Kardamummubýin. Men hvørt mansbarn í Føroyum kennir eisini sera væl Djórini í Vallbakkaskóginum og Karius og Baktus. Hóast hann legði grundarsteinin til Kardamummubýin í Kristiansand 22. apríl í 1990, so upplivdi hann ikki, at býurin læt upp árið eftir. Thorbjørn Egner doyði jólaaftan í 1990, 78 ára gamal.

## Kardamummukøka

220 g av margarini, knapt 300 g av sukri, 3 stór ella 4 lítil egg, 500 g av hveitimjøli, 1 pakka av bakipulvuri, kardamumma, rosirnir, mjólk

Rør margarin og sukur saman og rør síðani eggini í, eitt í senn. Rør bakipulvur, kardamummu og rosinir í mjølið, og lat í deiggið saman við mjólkini. Koyr í tveir smurdar formar og baka køkurnar umleið 1 tíma við 180 stigum.

Køkan smakkar best, tá hon er nýbakað og við kaldari mjólk afturvið.



# ava við at gera«



*Tornið hjá Tobiasi er sum vera man miðpunkt í Kardamummubýnum í Kristiansand. Har eru øll húsini bygd í »veruligari« støðd - júst soleiðis, sum Thorbjørn Egner vildi hava tey*

einum øki upp á 50 ferðir 50 metrar. Flestu húsini vóru millum 30 og 50 fermetrar. Uttan fyri býin liggur býarparkin við amfi og karusell, og nakað norðan fyri býin, passaliga langt burturin, liggur dólgaborgin.

Hendan dagin, vit vitjaðu í Kardamummu, var veðrið avbera gott og nógv fólk vitjaðu býin. Kl 12 byrjaði leikurin á torginum framman fyri torninum hjá Tobiasi.

Bastian politimeistari gekk har so glaður og savnaði fólkið saman – tó at hann ikki hóskaði eins væl til leiklutin, sum okkara egni Jógvan Ósá, sum er tann føddi Bastian! (Eg ímyndi mær, at Thorbjørn Egner hevur havt Jógvan Ósá sum fyrimynd, tá hann skrivaði bókina og skapti Bastian...)

Vit hittu eisini Berg keypmann, bakaran, slaktaran, Suffíu mostur og dólgarnar. Tú kundi ganga runt í býnum og vitja tey hús, tær lysti, og soleiðis vóru vit sjálvandi uppi í torninum hjá Tobiasi, á politistøðini, inni hjá Suffíu og aðrastaðni við – og sjálvandi eisini ein túr við sporvogninum hjá Sývarson – sum hevði kakueskjuna við.

Vit vitjaðu eisini í dólgaborgini, sum lá uttan fyri býin – og vit mugu geva Suffíu mostur rætt tá hon sygnur: *»á dú og dú her er skitið...«*

Á heysti í 1990 vitjaði Thorbjørn Egner seinastu ferð Kardamummubýin, sum ikki var liðugur. Øll húsini vóru kortini undir taki, og Egner skuldi sjálvur gera ymiskt arbeiði, so sum at velja litir, dekorera hurðar, húsanummur o. a.

Tíverri kláraði hann ikki at gera hetta liðugt, tí hann doyði brátt eftir stutta sjúku jólaaftan sama árið.

Men tað var kona hansara, Anna, sum klipti snórin, tá býurin læt upp 8. juni 1991 meðan Kardamummuorksetrið spældi.

»Og mitt í tí heila fór tað at regna, sjálvt um gamli Tobias hevði hopað, at tað skuldi verða deiligt summarveður. Og øll blivu vát, men tað sleit skjótt íaftur og veitslan kundi halda fram«, skrivar Bjørn Egner í bókini »Kardamummubýur í Kristiansand Dyrepark«.

Thorbjørn Egner náddi ikki at uppliva býin lidnan. Men býurin varð fullførdur við lívi og virki, so sum Egner hevði formað hann og droymt um, at hann skuldi verða.

Kardamummubýur í Kristiansand gjørdist kardamummukrúnan á verkinum hjá Thorbjørn Egner,

Men hvat er so Kardamummubýur – í veruleiknum?

Thorbjørn Egner segði sjálvur, at hann vónaði, at bæði stór og smá »... fara at finna eina djúpari meining: at eingin bara er hetja og eingin bara er skurkur, og vit mugu góðtaka, at menniskju eru eitt sindur ymisk – og royna at skilja hvønnannan«.



*Við sporvogninum hjá Sývarson slepst úr enda í annan í Kardamummubýi - og Sývarson hevur køkurnar í eskjuni, og hann bjóðar!*



*Jónas og Anna í fangatippinum hjá Bastian politimeistara...*



*Teir tríggir dólgarnir, tá leikurin varð fram framførdur í Kardamummubýi*



*Eins og í bókini liggur Dólgaborg nakað uttan fyri Kardamummubý. Hugskotið til húsini fekk Thorbjørn Egner á Rhodos*